Tryggingareftirlitið

**Tórshavn 8. juli 2019**
Journalnr.: 17/00106-28

**Hoyringarskriv**

**Uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum**

Tryggingareftirlitið sendir við hesum *Uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum* til hoyringar, sí viðhefta fylgiskjal.

Tryggingareftirlitið er vorðið varugt við, at í nýggju roknskaparkunngerðini (kunngerð nr. 4 frá 27. juni 2018 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum) eru nøkur viðurskifti, ið tørvur er á at nágreina og rætta.

Talan er um hesi viðurskifti:

1. Striking av serligu ásetingum um váðaíkast (risikomargen) á avsettum tryggingargjøldum (præmiehensættelser) í skaðatrygging.
2. Flyting av upplýsingum um solvensdekning frá lyklatølunum í 5-árs yvirlitinum til leiðslu-frágreiðingina.

Broytingarnar eru lýstar nærri í *Notat om ændring af bekendtgørelse nr. 4 af 27/06/2018 om finansielle rapporter for forsikringsselskaber og forsikringsholdingvirksomheder* (j.nr. 17/00106-30), sí viðhefta fylgiskjal.

Nýggja broytingarkunngerðin um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum verður eftir ætlan sett í gildi 28. august 2019 og hevur virknað fyri roknskapárárið, ið byrjar 1. januar 2019.

Møguligar viðmerkingar til uppskotið til broytingarkunngerð skulu vera Tryggingareftirlitinum í hendi í seinasta lagi 19. august 2019.

Viðmerkingar og spurningar kunnu sendast við telduposti til gn@tryggingareftirlitid.fo ella til Tryggingareftirlitið stílað til Gudmundur Effersøe Nónstein, Skálatrøð 20, Postboks 73, FO-110 Tórshavn.

Vinarliga

Jógvan Thomsen

Stjóri

/Gudmundur Effersøe Nónstein